tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 31.05.2022 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Jónleyg Jespersen Bech møtur kl. 18:35, og var bert við til viðgerðina av málinum: 32/22, 36/22, 39/22, 40/22, 41/22, 42/22, 43/22, 44/22, 25/22

Kristina Roest fór av fundinum kl. 19:40, og var ikki við til viðgerðina av málinum: 39/22, 40/22, 41/22, 42/22, 43/22, 44/22

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| Málsyvirlit | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 29/22 | 22/00137-1 | Tvøroyrar skúli -Leasingsáttmálið Sp.F Aktiv farteldur til lærarar |
| 30/22 | 22/00187-2 | Umsókn um at fáa til keyps eitt jarðastykki inni á Tanganum |
| 31/22 | 22/00206-1 | Uppskot um limagjald til ungdómshúsið Pakkhús 4 |
| 32/22 | 22/00222-2 | BHS Bú- og Heimatænastan í Suðuroy -Ársroknskapur 2021 |
| 33/22 | 22/00245-1 | Articon -Fyrisp. um leingjan av leigusáttmála til skúrbý og blandistøð á Drelnes |
| 34/22 | 22/00252-1 | Tvøroyrar kommuna -Roknskapur 2021 |
| 35/22 | 21/00062-3 | Nýggjar bátabrúgvar í bátahylinum á Tvørábakka |
| 36/22 | 21/00382-2 | Posta -Leigusáttmáli um avgreiðslubyggning matr.nr. 374 í miðbýnum (Posta-bygningurin) |
| 37/22 | 21/00455-2 | Leigusáttmáli millum TVK og ESp.f. 13-15 -Um leigu av GL.Kgl.Handlinum Pub&Cafe |

| | | |
|---|---|---|
| 38/22 | 21/00516-4 | HTO v./ Klæmint Øster -Martin E. Leo uppskot til semju viðv. avhandan av verkætlan á Rananum |
| 39/22 | 22/00246-2 | LUKKA MÁL |
| 40/22 | 22/00243-3 | LUKKA MÁL |
| 41/22 | 21/00036-3 | LUKKA MÁL |
| 42/22 | 22/00240-1 | LUKKA MÁL |
| 43/22 | 22/00220-2 | LUKKA MÁL |
| 44/22 | 21/00537-10 | LUKKA MÁL Skuldarar -debitor top 10 listi |
| **Til kunningar** | | |
| 21/22 | 22/00096-1 | Skattatøl 2022 |
| 22/22 | 22/00190-2 | IRF -Ársaðalfundur 2022 |
| 23/22 | 22/00224-2 | Tvøroyrar skúli -hagtøl / næmingatal |
| 24/22 | 21/00451-20 | LUKKA MÁL |
| 25/22 | 21/00490-1 | LUKKA MÁL BHS Bú- og heimatænastan, kunning um virksemið 2021 |
| | | |

Kristin Michelsen setur fundin, og kunnar um, at Jónleyg Jespersen Bech hevur fráboða at hon ikki kann møta kl. 17.00, men verður nakað seinkað.

Borgarstjórin spyr um viðmerkingar eru til skránna.

Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt, at hon hevur ynskið um 3 mál á skrá. Súsanna ynskir at val av stýrislimum í Bú- og heimatænastuna umboðandi Tvøroyrar kommunu verður sett á skrá av nýggjum, har limirnir blíva valdir samb. lutfallvalháttinum.
Eisini ynskir Súsanna Bertholdsen at setanin av leiðara í Bú- og Heimatænastuni í Suðurounni, BHS kemur á skrá, samt at býráðið umrøður Suðuroyarsiglingina, meðan Smyril er í dokk.

Kristin Michelsen upplýsir, at val av stýrislimum í Bú- og heimatænastuna BHS er avgreitt av Tvøroyrar býráð, við 3 viðgerðum og samtyktum í januar og februar 2021, samt 3. februar 2022.

Kristin Michelsen kunnar um, at setan av leiðara í BHS, Bú- og Heimatænastuni í Suðuroynni er mál, sum stýrið fyri BHS avgreiðir, og at Suðuroyarsiglingin er mál, sum SSL og landstýrismaðurin í samferðslumálum varar av. Tvs. at hetta eru mál, sum býráðið ikki varar av og viðgerð.

Men, um tað eru viðkomandi viðurskiftir á hesum økinum, verður býráðið kunna. Kristin Michelsen upplýsir, at Suðuroyarsiglingin er sera viðkomandi mál, sum allar kommunur í Suðuroynni eiga at vera felags um, og tosa við einari felags rødd, har allir borgarstjórar í Suðuroynni fyrst tosa saman og fráboða eina felags útmelding fyri alla Suðuroynna.
Einmælt samtykt at heita á borgarstjóran um at taka stig til fund millum allar borgarstjórar í Suðuroynni um siglingina hjá SSL um Suðuroyarfjørð, tá Smyril er í dok.

Til støðutakan

**29/22**
**22/00137-1 Tvøroyrar skúli -Leasingsáttmálið Sp.F Aktiv farteldur til lærarar**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 08.03.2022 | 20/22 |
| 2 Mentanarnevndin | 05.04.2022 | 42/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.04.2022 | 38/22 |
| 4 Býráðið | 05.05.2022 | 25/22 |
| 5 Býráðið | 31.05.2022 | 29/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 5. Mars. 2022**
Forkv. í mentanarnevndini hevur á fundi við skúlastjóran umrøtt leasing avtaluna um teldur til lærarar, sum gongur út tann 31. Juli 2022.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:** Ongin játtan er beinleiðis avsett á FÆ2022, at endurnýggja leasingavtaluna. Játtan er avsett til íløgur skúli 3.624tkr.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndin og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 08. marts 2022:**
Málið verður flutt til næsta fund

**Mentanarnevndin 05. april 2022:**
Einmælt samtykt at endurnýggja leasingavtaluna, og at hetta verður fíggja við eykajáttan til FÆ2022 §410.

**Fíggjarnevndin 21. april 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Mentanarnevndini. –Málið verður beint í Býráðið

**Býráðið 05. maj 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Mentanarnevndini. Játtanin verður fíggja av innistandandi við at veita eykajáttan til §410.

**Býráðið 31. maj 2022:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð, at veita eykajáttan til leasingavtalu um teldur til lærarar.

**30/22**

**22/00187-2 Umsókn um at fáa til keyps eitt jarðastykki inni á Tanganum**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 21/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 54/22 |
| 3 Býráðið | 31.05.2022 | 30/22 |

**Málslýsing:**
Umsókn er komin um at keypa uml. 350 m2 frá vegøki "at" á Tanganum.



**Tilmælið:**
Mælt verður til at selja stykkið.

**Tekniska nevnd 04. apríl 2022:**
Einmælt samtykt at selja stykki og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Kommunustjórin 14.05.2022**

Víst verður til kommunustýrislógina um alment útboð av kommunalari fastogn

*Við heimild í § 44, stk. 1, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin) verður ásett:*
*§ 1. Um ikki annað er ásett í lóggávuni, skal fastogn hjá kommununi verða boðin út alment, áðrenn ognin verður seld, sbr. tó § 2.*

**Fíggjarnevndin 18. maj 2022:**
Einmælt samtykt at selja og at hetta verður boðið út alment, samb. galdandi reglum, og umsitingin ásetur prís samb. almennar reglugerð.

**Býráðið 31. maj 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**31/22**
**22/00206-1 Uppskot um limagjald til ungdómshúsið Pakkhús 4**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 07.04.2022 | 17/22 |
| 2 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 11.05.2022 | 19/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 52/22 |
| 4 Býráðið | 31.05.2022 | 31/22 |

**Málslýsing:**
Leiðarin av Pakkhús 4 ynskir at fáa viðgjørt, at fáa álagt limaskap fyri at vera partur av Pakkhús 4. Nærri frágreiðing er í viðlagdum telduposti frá leiðaranum.

**Tilmælið:**
Við hesum verður málið lagt til trivnaðar- og umhvørvisnevndina og møguliga fíggjarnevndina, til støðutakan.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 07. april 2022:**
Nevndin ynskir at útseta málið og at Arthur er við á næsta nevndarfundi.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 11. maj 2022:**
Arthur greiddi frá, at ætlanin er ikki at útihýsa børn sum ikki eru limir.
Limagjaldið skal fíggja innkeyp av troyggjum, og tað kann fara av frítíðarkortinum.

Nevndin mælir til at limagjaldið verður 300kr , sum leiðarin ynskir, og sum dekkar keyp av troyggjum. Limagjaldið kann ikki hækkast uttan góðkenning frá býráðnum. Limagjaldið kann fara av frítíðarkortinum.

**Fíggjarnevndin 18. maj 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndin

**Býráðið 31. maj 2022:**
Súsanna Bertholdsen mælir frá at hava limagjald til ungdómshúsið, og ynskir at ungdómshusið er meira at meta sum eitt fristað hjá børnum uttan gjald og krøv.
Atkvøtt verður um tilmælið hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini:
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer
Ímóti: Súsanna Bertholdsen
Blankt: Kristina Roest,

32/22

**22/00222-2 BHS Bú- og Heimatænastan í Suðuroy -Ársroknskapur 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 56/22 |
| 2 Býráðið | 31.05.2022 | 32/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 14.05.2022**
Umsitingin hevur frá Fíggjarmálaráðnum móttikið endaligu uppgerð og býtið av rakstrargjaldinum fyri 2021 til Bú- og Heimatænastuna í Suðuroynni og boð um at gjalda inn írestandi gjald.

| Kommuna | fólkatal | kostnaður 2021 | Goldið Higartil | Javning | Viðm. |
|---|---|---|---|---|---|
| Hvalbiar kommuna | 134 | 8.896.490,54 | 8.520.000,00 | 376.490,54 | restar í |
| Tvøroyrar kommuna | 339 | 22.506.793,24 | 20.695.557,00 | 1.811.236,24 | restar í |
| Fámjins kommuna | 29 | 1.925.359,89 | 1.508.231,12 | 417.128,77 | restar í |
| Hovs kommuna | 23 | 1.527.009,57 | 1.416.660,00 | 110.349,57 | restar í |
| Porkeris kommuna | 74 | 4.912.987,32 | 4.964.487,45 | - 51.500,13 | avlop |
| Vágs kommuna | 273 | 18.124.939,69 | 17.010.000,00 | 1.114.939,69 | restar í |
| Sumbiar kommuna | 73 | 4.846.595,59 | 4.619.544,00 | 227.051,59 | restar í |
| | 945 | 62.740.175,85 | 58.734.479,57 | 4.005.696,28 | |

**Býtið er roknað við støði í roknskapinum á næstu síðu og talinum av borgarum 67 ár ella eldri pr. 31. des. 2020 sum*

Gjaldsstovan hevur avroknað við kommunurnar í Suðuroy, tað sum eftir er fyri 2021. Allar kommunurnar uttan Famjins kommuna hava leysgivið, tað sum restar í.

Fíggjarmálaráðið heitir tí á Gjaldstovuna um at avgreiða javningina fyri Famjins kommunu umvegis kommunuavrokningina.

Mint verður á, at upphæddirnar hoyra til roknskapin fyri 2021, og at tær skulu bókast á standardroknskaparkonto 7140, høvuðskonto 21.61.xx2 og undirkonto 10.

Mælt verður til at samtykkja uppgerðina sum fyriliggjandi, og at henda verður bóka samb. áheitan frá Fíggjarmálaráðnum

**Lógargrundarlag: Eldrasamstarvið**

**Fíggjarligar avleiðingar:** Meira játtan til Raksturin av BHS fyri FÆ2021 á kr. 1.811.236,-, sostatt er raksturin hjá Tvøroyrar kommunu til BHS fyri 2021 kr. 22.506.793,-
**Verður fíggja av innistandandi.**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 18. maj 2022:**
Málið var umrøtt, og einmælt samtykt, við áheitan á stýrið fyri Eldrasamstarvið BHS at halda fíggjarætlanina.

**Býráðið 31. maj 2022:**
Einmælt samtykt roknskapin hjá BHS fyri 2021

**33/22**

**22/00245-1 Articon -Fyrisp. um leingjan av leigusáttmála til skúrbý og blandistøð á Drelnes**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 62/22 |
| 2 Býráðið | 31.05.2022 | 33/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 16.05.2022**
Borgarstjórin hevur samskift við stjóran á Articon, ið ynskir at leingja leigusáttmálan til skúrbý og blandistøð á Drelnes. –Mál í SBSYS 08.03.04

**Lógargrundarlag:** -Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:** -Leigusáttmálið av havnaøkið

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 18. maj 2022:**
Einmælt samtykt at leingja leigusáttmálan við Articon, samb umsókn dagf. 18. mai 2022.

**Býráðið 31. maj 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini at leingja leigusáttmálan við Articon, samb umsókn dagf. 18. mai 2022.

**34/22**
**22/00252-1 Tvøroyrar kommuna -Roknskapur 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 31.05.2022 | 67/22 |
| 2 Býráðið | 31.05.2022 | 34/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 30.05.2022**
Borgarstjórin, fíggjarleiðarin og kommunustjórin hava gjøgnumgingið roknskapin fyri Tvøroyrar kommunu 2021, sum er grannskoðaður av Løggilda grannskoðaravirkinum Januar, Óðinshædd 13, 110 Tórshavn.

Vísandi til § 46 í kommunustýrislógini verður roknskapur og grannskoðanarprotokoll hervið løgd fyri fíggjarnevndina at góðkenna. Um fíggjarnevndin ongar viðmerkingar hevur, beinir nevndin roknskapin og protokollina í býráðið at viðgera/góðkenna.

Býráðið skal eisini taka støðu til val av grannskoðara fyri ár 2022. Greinin er soljóðandi

> *"Í samband við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal verða valdur. Stk. 2. Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum".*

**Frágreiðing um grannskoðanina**

**Niðurstøða av framdu grannskoðanini – grannskoðanarátekning**
5 Grannskoðanin av ársfrásøgnini hevur ikki givið orsøk til atfinningarsamar viðmerkingar. Um so er, at kommunustýrið góðkennir ársroknskapin í verandi líki, geva vit honum eina grannskoðanarátekning uttan tillagingar og áherðslur.

Harumframt hava vit í samsvari við § 10, stk. 7, í kunngerð um roknskaparverk kommunanna o.til. kannað eftir, at upplýstu tølini til Fíggjarmálaráðið fyri tey einstøku tíðarskeiðini samsvara við bókhaldið hjá kommununi, og hava vit gjørt eina átekning uttan vissu í hesum sambandi.

6. Grannskoðanin er farin fram í mai 2022. Allir postar eru gjøgnumgingnir.

**Samanbering av roknskapi við fíggjarætlan og fíggjarliga gongdin**
8 Í sambandi við grannskoðanina er hugt eftir gongdini í bæði rakstri og løgum í 2021. Niðanfyri er ein talva, sum líkist høvuðsyvirlitinum í ársroknskapinum, sum vísir nettogongdina í 2021. Tølini í talvuni niðanfyri eru nettotøl og ikki bruttotøl.

Í fíggjarætlanini fyri 2021 varð roknað við einum RLÚ á 21.872 tkr. Ætlanin var at niðurrinda skuld við 3.377 tkr., og at aðrar fíggjarbroytingar vóru á 25.249 tkr. Netto gevur hetta 21.872 tkr. Ársroknskapurin vísir eitt realisera yvirskot á 966 tkr. Hetta gevur ein nettomun millum fíggjarætlan og roknskap á 22.838 tkr. Niðanfyri er útgreining av, hvussu hesin munur er nýttur:

**Broytingin er nýtt soleiðis:**

| | |
|---|---|
| Broyting í áogn, peningi og aðrari skuld | -19.689 |
| Broyting í lániskuld | -214 |
| Broyting í gjaldføri | -2.935 |
| | -22.838 |

**Játtan og nýtsla**

10 Vísandi til høvuðsyvirlitið í ársroknskapinum fyri 2021 hjá Tvøroyrar kommunu og yvirlitið omanfyri, er nettomeirnýtsla staðfest á einari grein. Flestu greinir hava minninýtslu í mun til ætlanina. Meirnýtsla er staðfest í Almanna- og heilsumálum. Hetta kemst serliga av, at tað í 2021 hevur víst seg, at útreiðslurnar til Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy vóru 1.754 tkr. hægri enn tað, sum kommunan hevði við í fíggjarætlanini fyri 2021. Í løgunum er meirnýtsla ikki staðfest á nakrari grein. Í inntøkunum er staðfest ein meirinntøka á 6.585 tkr.

Vit vilja tó gera vart við, at um peningur skal nýtast út yvir játtan, so skal hetta viðgerast av fíggjarnevnd og býráði, áðrenn peningurin verður brúktur.

**Fíggjarliga gongdin**

11 Samlaði raksturin hjá kommununi er í 2021 72.581 tkr., og er nakað hægri enn undanfarna ár, tá hann var 70.404 tkr. Hækkingin er á 3,1%. Inntøkurnar hjá kommununi eru á 91.366 tkr. og eru nakað hægri enn undanfarna ár, tá tær vóru 89.216 tkr. Hækkingin er á 2,4%. Á løgusíðuni hevur kommunan nýtt 17.819 tkr. í 2021 samanborið við 14.306 tkr. í 2020. Størstu løgurnar hava verið gjørdar á hesum økjunum: Barnagarðurin 1.276 tkr., Fólkaskúlin 2.793 tkr., Umsiting og røkt av fastognum 6.290 tkr., Vatnverkið 1.200 tkr., Vegir 3.081 tkr. og Tvøroyrar havn 1.631 tkr.

**Samlað skuld í mun til álíkning**

26 Niðanfyri er eitt yvirlit yvir nettoskuld í mun til álíkning:

| | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|
| Nettoskuld ultimo (tkr.) | -35.850 | -36.815 | -40.541 | -20.053 | -29.024 |
| Álíknaður skattur umr. til 23 % | 74.796 | 72.159 | 66.220 | 66.762 | 63.642 |
| Svarandi til álíkning | -0,48 | -0,51 | -0,61 | -0,30 | -0,46 |

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018

> §38, at leggja grannskoðaðan roknskap saman við grannskoðanarfrágreiðingini fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar.

**Fíggjarligar avleiðingar:** Fíggjar- og rakstrarætlan fyri Tvøroyrar kommunu

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

__Fíggjarnevndin 31. maj 2022:__
Fíggjarnevndin mælir einmælt til at samtykkja roknskapin. Málið verður beint í býráðið.

__Býráðið 31. maj 2022:__
Einmælt samtykt roknskapin fyri 2021.
Einmælt samtykt at halda fram við sama grandskoðara.

**35/22**
**21/00062-3 Nýggjar bátabrúgvar í bátahylinum á Tvørábakka**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 10.05.2021 | 16/21 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 04.06.2021 | 23/21 |
| 3 Vinnu- og havnanevndin | 08.11.2021 | 39/21 |
| 4 Vinnu- og havnanevndin | 07.02.2022 | 2/22 |
| 5 Vinnu- og havnanevndin | 07.03.2022 | 2/22 |
| 6 Vinnu- og havnanevndin | 04.04.2022 | 5/22 |
| 7 Fíggjarnevndin | 21.04.2022 | 45/22 |
| 8 Býráðið | 05.05.2022 | 24/22 |
| 9 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 64/22 |
| 10 Býráðið | 31.05.2022 | 35/22 |

**Málslýsing Tekniskur leiðari 06-05-2021:**
Hugt hevur verið at ymiskum loysnum og enn er niðurstøðan at ein smiðju loyn er væl dýrari enn ein liðug system loysn. Allar loysnir sum skulu nýtast fara at krevja at arbeiði skulu gerast á staðnum. Hesi arbeiði kunnu gerast av lokalum veitara.
Ymiskar loysnir eru:
Tann sum vit kenna frá bátahylinum á Tvørábakka í dag, har ein flótibrúgv er fest í land og á flótibrúgvina er fest 8 metrar armar, til bátaplássini. Henda loysn fylgir flóð og fjøru, so armar og flótibrúgv altíð liggja í somu hædd yvir havyvirflatuni.
Onnur loysn sum er nýtt, er tann sum er í Bærentshavinum, har armar eru festir beinleiðis í land og eru armarnir gjørdur við einum eyka liði millum land (2 lið á sjálva arminum) og sjálva bátabrúgvina. Hesar brúgvar eru sera "livandi" og loysn sum er nýtt virkar, men júst henda hevur tann vansa, at flóti undir miðjuni er ov lítið og tí søkur miðjan langt niður, tá ein gongur út eftir arminum.
Aðrar loysnir kundi verið at haft eina stál kai kant og so 2 lið armin, hetta er sama loysn sum í Bærentsenhavinum, har betong kanturin er skiftur út við stál.
Hvør leistur og loysn skal nýtast.

**Vinnu- og havnanevndin 10. maj 2021:**
Nevndin ynskir at arbeitt verður víðari við málinum.

**Vinnu- og havnanevndin 04. juni 2021:**
TD ger nýt útbjóðingartilfar í mun til bátabrúgvarnar.

**Vinnu- og havnanevndin 11. oktober 2021:**
Nevndin ynskir at innari kanturin verður gjørdur fastur og at tekniska deild heintar tilboð inn uppá hettar arbeiði, skjótast gjørligt. Líknandi loysn sum er í hylinum í Trongisvági.

**Málslýsing - Tekniskur leiðari 04-11-2021:**
Fundur hava verið við tveir ymiskar lokalar veitarar um ymiskar loysnir, uttan at loysnir hava verið endaligar og ítøkiligar.

**Lógargrundarlag:**
NA

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Peningur er settur av til bátabrúgvar á FÆ21.

**Tilmælið:**
At gera eitt nøktandi útbjóðingar tilfar.

**Vinnu- og havnanevndin 08. november 2021:**
Eimælt samtykt at bjóða arbeiði út til tveir ellar trýggjar lokalar veitarar uppá at gera fastan kant og bátabrúgavar. Hettar verður gjørt av tekniska leiðaranum í viku 46/ 2021. Loysnin sum nevndin ynskir er at innari kanturin verður gjørdur fastur. Líknandi loysn sum er í hylinum í Trongisvági.

**Tekniski leiðarin 03-02-2022:**
Tilfar at bjóða út er liðugt.

**Vinnu- og havnanevndin 07. februar 2022:**
Einmælt samtykt at bjóða arbeiðið út grundað á fyriliggjandi útbjóðingartilfar.

**Vinnu- og havnanevndin 07. marts 2022:**
Útbjóðingar tilfar er sent út til tryggjar veitarar. Ástaðar fundur hevur verið og tilboð uppá bátabrúgvar vera latin inn 21.03.2022.

**Tekniski leiðarin 01-04-2022**
Tríggjar fyritøkur vóru spurdar um at geva tilboð uppá at gera nýggjar bátabrúgvar í bátahylinum undir Tvørábakka. Tvær fyritøkur hava sligið seg saman um at geva tilboð og var hettar móttikið 28.03.2022. Tilboðið var áljóðandi kr. 4.603.653,-. Síðani hevur verið fundur við partarnar, har hugt hevur verið eftir sparingum. Við at gera broytingar er komið fram til eina sparing á 362.000,-. Sum støðan er nú í mun til veitingar so er av al stórum týdningi at arbeiðini vera sett í verk, fyri ikki at fleiri príshækkanir skulu koma. Tekniska deild metir at arbeiðini við at bíleggja stál skulu setast í verk beinanvegin. Á FÆ22 eru settar av 4.000.000,- til hettar arbeiði.

**Vinnu- og havnanevndin 04. april 2022:**
Einmælt samtykt at fara víðari við innkomna tilboðnum og at seta bílegging av stálið í verk. Tekniska deild arbeiðir víðari við at gera endaliga avtalu við veitarar. Málið verður beint í fíggjarnevndina og møguliga býráðið.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2022:**
Einmalt samtykt tilmælið hjá Vinnu- og havnanevndini. –Málið verður beint í Býráð.

**Býráðið 05. maj 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Vinnu- og havnanevndini.

**Kommunustjórin 16.05.2022**
Tvøroyrar kommuna hevur tikið av tilboði frá arbeiðstakarum -ávikavist MTV-Byggivirkið og Bærendsen Teknik- um dagføringar á bátahylin á Tvørabakka fyri arbeiðstøku á ílat kr. 4.241.653,-.
Bærendsen Teknik hevur sett fram ynskið um, at Tvøroyrar kommuna stillar Ákontogjald á kr. 848.330,- ex. MVG til Bærendsen Teknik, svarandi til 20% av samlaði tilboðsupphæddini við bílegging av stáli og tilfar til framleiðsluna av nýggjum bátabrúgvum.

**Fíggjarnevndin 18. maj 2022:**
Einmælt samtykt at veita Bærendsen Teknik ákontogjald á kr. 848.330,- ex. MVG, svarandi til 20% av samlaði tilboðsupphæddini við bílegging av stáli og tilfar til framleiðsluna av nýggjum bátabrúgvum.

**Býráðið 31. maj 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**36/22**
**21/00382-2 Posta -Leigusáttmáli um avgreiðslubyggning matr.nr. 374 í miðbýnum (Posta-bygningurin)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.04.2021 | 16/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.06.2021 | 8/21 |
| 3 Býráðið | 16.06.2021 | 14/21 |
| 4 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 69/21 |
| 5 Býráðið | 28.10.2021 | 66/21 |
| 6 Fíggjarnevndin | 21.12.2021 | 95/21 |
| 7 Býráðið | 21.12.2021 | 90/21 |
| 8 Býráðið | 30.03.2022 | 21/22 |
| 9 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 51/22 |
| 10 Býráðið | 31.05.2022 | 36/22 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 13.04.2021)**
Posta –Janus Rasmussen- hevur vent seg til kommunustjóran, við ynskið um fund 12. Apríl, at viðgera leigusáttmálan millum Tvøroyrar kommunu og Posta av avgreiðsluhølinum á Sjógøtu 2.

Posta hevur leiga frá Tvøroyrar kommunu í árini 2019 og 2020 alla niðari hæddina, men ynskir frá 2021 at minka um leigumálið, frá 225m$^2$ til 173,5m$^2$. Tvs. at avgreiðsluhøli ikki verður partur av leigumálinum.

Kommunustjórin mælir til at ganga umsóknini á møti, og at nýggjur leigusáttmáli verður gjørdur millum Tvøroyrar kommunu og Posta, galdandi frá 01.01.2021. -Hetta tó treyta av, at leigugjøld fyri 2019 og 2020 fyrst verða avgreidd.

**Fíggjarnevndin 22. april 2021:**
Einmælt samtykt at takan undir við uppskotinum at leiga Posta 173,M$^2$, tó treya av øll eftirstøða fyri árini 2019 og 2020 er goldin

**Fíggjarnevndin 14. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Býráðið 16. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað –Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá umsitingini.

**Kommunustjórin 20 juli 2021:**
Posta og umsitingin hjá Tvøroyrar kommunu hava ikki verði samd um hvussu gjaldast skal fyri el og hita árini 2019 og 2020, har í sáttmálanum er ásett, at leigarin rindar umframt leigugjald fyri el og hita.

Posta hevur hildi hesar útreiðslur fram til 2019, tá Posta var einsamalt í bygninginum. Men tá Posta flytur úr ovari hæddini, -og eftir at eftirskúlin byrjar sítt virksemið í bygninginum-, metur Posta tað ikki vera rætt, at Posta ber allan kostnaðin av el og hita fyri árini 2019 og 2020.

Umsitingin mælir til semju, har Tvøroyrar kommuna og Posta bera ½ av kostnaðinum fyri el og hita fyri árini 2019 og 2020, og at Posta pr. 1. januar 2021 ber kostnaðin fyri el og hita samsvarandi við ferðmetrarnir, sum Posta leigar lutfallið 171/283 lutfalli av samlaða leigu vídd m2, ið verður uppgjørt árliga, samsvarandi galdandi og dagførdan leigusáttmála millum Tvøroyrar kommunu og Posta av Sjógøtu 2.

**Kommunustjórin 21. Okt. 2021.**
Eftir nógv samskiftið við Posta, har umsitingin hjá Tvøroyrar kommunu og leiðslan hjá Posta vóru komin ásamt um, hvussu Posta kann innrætta seg í bygninginum á Sjógøtu 2, nú stóra avgreiðslu hølini ikki longur ynskjast at vera leiga av Posta.

Nýggir leigusáttmáli er gjørdur, har hædd verður tikið fyri gjald av el og hita í lutfallið við fermetrarnir leiga verður. Og partarnir eru samdur um útreiðslurnar fyri el og hita árini 2019 og 2020, vera deildar 50/50 millum Posta og TVK.

Kortini vil stjórin á Posta ikki gjalda leigu av avgreiðsluhølini longur enn til 1. Januar 2021, og hevur broytt leigusáttmálan samsvarandi. (Posta hevur annars virka í allari niðari hæddina á Sjóðgøtu 2, fram til 1. Sep. 2021, tá Posta flutti úr avgreiðsluhølinum )

At taka støðu til hjá fíggjarnevndini er um nýggi leigusáttmálin við Posta skal vera galdandi frá:

- 1. Januar 2021
  1. Aug. 2021

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt, at verandi sáttmálin við POSTA skal vera at byrja frá 1. aug. 2021. Um Posta ikki góðtekur hesa áseting innan 30. november 2021, verður Posta uppsagt pr. 1. januar 2022

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**Kommunustjórin 03.12.2021**
Staðfest er d.d. at Posta ikki hevur góðtikið leigusáttmálan av Sjógøtu 2. -Kommunustjórin hevur sent stjóranum á Posta áminning 22.11.2021 um at góðkenna og undirskriva leigusáttmálan. Stjórin á Posta Joel undir Leitinum svarar 22.11.2021, at hann ikki góðtekur leigusáttmálan.

Ósemjan er um nýggja leigumálið skal byrja 1. Januar 2021 ella 1. August 2021.

Posta heldur uppá at nýggja leigumálið skal byrja 1. Januar meðan Tvøroyrar kommuna heldur uppá at nýggja leigumálið skal byrja 1. August 2021.

Munurin á hesum dagfesting er tann, at Posta hevur frammanundan leigusáttmála við TVK, har Posta hevur leiga alla niðari hæddina á Sjógøtu 2. Men Posta hevur vent seg til Tvøroyrar kommunu fyri at fáa avslag í leigu prísinum, og ynskið um at flyta út úr avgreiðsluhølinum, og fáa loyvið til at innrætta seg øðrvísi á minni ferðmetrum.

Hetta hevur TVK loyvt og játta Posta at gera, og er leiguprísurin farin frá kr. 825,-/m2 til kr. 600,-/m2. Eisini hevur Posta fingið loyvið til at innrætta seg á minni ferðmetrum, og at broyta smávegis uppá bygningin.

Men við tað at Posta ikki er flutt út úr avgreiðsluhølinum fyrr enn í sep. 2021, metur TVK, at Posta skal rinda leigu fyri brúk av avgreiðsluhølinum fram til 1. Aug. 2021. Avgreiðsluhølið er uml. 75m2 til støddar og leigugjaldið fyri hetta (jan.-aug.) 8. Mnd. er (600x75x8/12) kr. 30.000,-

**Til støðutakan er:**

1. Um at halda fast við at uppsiga leigusáttmálan við Posta av Sjógøtu 2 pr. 31. Desember 2021 orsakað av at Posta ikki vil góðtaka dagfestingina á leigusáttmálanum.
2. Samráðast um eina semja har Posta og Tvøroyrar kommunu t.d. deila 50/50 leigugjaldið á kr. 30.000,-, ið er gjald fyri leigu av avgreiðsluhølinum í 8. mnd. av 2021.

**<u>Fíggjarnevndin 21. december 2021:</u>**
Einmælt samtykt at halda fast við at uppsiga leigusáttmálan við Posta av Sjógøtu 2 pr. 31. desember 2021 um eftirstøðan fyri avgreiðsluhølini ikki er goldin innan 31.12.2021.

**<u>Býráðið 21. december 2021:</u>**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini.

**<u>Kommunustjórin 22.03.2022</u>**
Umsitingin hevur mótið teldupost frá Stjóranum í Posta, sum kunnar at:

- *Posta ætlar sær í onnur høli á Tvøroyri. Hesi hølir verða væntandi tøk í maj mánaði 2022, og vil tað siga at Posta tá væntar at vera úti úr verandi hølum hjá Tvøroyrar kommunu.*
  *Vónandi er hetta í lagi soleiðis at Posta og Tvøroyrar Kommuna tá ikki hava nakað millumverandi.*

*-Joel undir Leitinum*

Hetta merkir at øll niðarahæddin "eystur" á 282m$^2$, í stóra avgreiðslubygninginum á Sjógøtu 2 mitt á Tvøroyri, verður at standa tóm eftir 1. juni 2022. Kommunustjórin metur, at hetta er spill av góðum og kostnaðarmiklum ferðmetrum. Her er talan er um ein stóran avgreiðslubygningur, ið lúkar øll krøv um atkomu fyri rørslutarnað og sum hevur góð parkeringsviðurskiftir.

Kommunustjórin mælir Tvøroyrar býráð til at viðgerða og taka støðu til eina langsiktaða loysn, hvat fyrv. Postabygningurin á Sjógøtu 2, sum kommunan hevur keypt í 2018 kann og skal brúkast til.

Eitt uppskot til loysn, sum Tvøroyrar býráð verður mælt at taka støðu til er, hvørt bygningurin kann hýsa Kunningarstovu og partar av avgreiðsluni hjá Tvøroyrar kommunu, sum halda til í býráðsskrivstovuni á Tvøravegi 37.

Umstøðurnar at parkera kring býráðsskrivstovuna eru ikki góðar og fólk, ið eru rørslutarnað hava ikki nøktandi atkomu til býráðsskrivstovuna og kunningarstovuna sum er. Harumframt liggja hesar avgreiðslur ikki sjónligar á Tvøravegi 37, sum er ein tíðandi fyrimunur hjá Kunningarstovuni.

Mett verður, at omanfyri viðurskiftir kunna vera loyst, um Kunningarstovan og partar av umsitingini flyta í fyrv. Postabygningin, ið er bygdur sum avgreiðslubygning.

**<u>Býráðið 30. marts 2022:</u>**
Kristin Michelsen mælir til at hølini, sum Posta nú hevur uppsagt, verður tørvsmett í Trivnaðar– og umhvørvisnevndina, sum ger nýtt tilmælið til fíggjarnevndina.

**<u>Kommunustjórin 16. april. 2022</u>**
Trivnaðar- og umhvørvisnevndin "Mál. 21/0076" mælir eftirfylgjandi til hin 7. april 2022, at alt økið í niðaru hæddini í «postabygninginum» verður brúkt til ungdómstilboð, og at alt verandi tilboð til ung verður flutt niðan í bygningin.

**<u>Fíggjarnevndin 18. maj 2022:</u>**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndin

**<u>Býráðið 31. maj 2022:</u>**
Borgarstjórin heitti á forkv. Í Trivnaðar og umhvørvisnevndini um at greiða frá ætlanini.
Atkvøtt var um tilmælið hjá Trivnaðar og umhvørvisnevndini:
Fyri vóru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Kristina Roest
Ímóti: Súsanna Bertholdsen
Harvið er uppskotið hjá Trivnaðar og umhvørvisnevndini samtykt.

Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt, at hon tekur ikki undir við uppskotinum, tí at ungdómshúsið skal vera har tað er í Pakkhús4, og Postabygningurin ístaðin verður brúkt til eitt Miðalhús til frama fyri allar borgarar á Tvøroyri.

37/22

**21/00455-2 Leigusáttmáli millum TVK og ESp.f. 13-15 -Um leigu av GL.Kgl.Handlinum Pub&Cafe**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 14.06.2021 | 41/21 |
| 2 Býráðið | 16.06.2021 | 18/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 59/22 |
| 4 Býráðið | 31.05.2022 | 37/22 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 19.05.2021)**
Tvøroyrar Kommuna hevur keypt og yvirtikið ogninar eftir TF.Thomsen matr. nr 492a, frá Sp.f. Coldstream pr. 1. mai 2021, har í m.a. var leigusáttmáli við Sp.F. 13-15. um raksturin av Gl. Kgl. Handlinum

Leigusáttmálin ásetur, at leigusáttmálin kann av báðum pørtum verða sagdur upp við 3. mnd frest til tann 1. í einum mnd., tó so, at útleigarin og leigari í fyrsta lagi kunna siga leigumálið upp 3. ár eftir at leigumálið tók við hin 13. Juni 2019.

**Leigugjaldið er ásett:**

- 2019 til kr. 5.000,-
- 2020 til kr. 7.500,-
- 2021 samb. sáttmálanum verður leigugjaldið ásett av nýggjum og ásett samb. prístalinum.
- Leigarin rindar fyri uttan fyri nýtslu av el og olju.

Tilmælið er at áseta leigugjaldið fyri 2021 ájavnt við leigusáttmálan, og leigusáttmálin verður óbroyttur við undantak av at útleigarin frá 1. mai 2021 at roknað, verður Tvøroyrar Kommuna.

**Fíggjarnevndin 14. juni 2021:**
Bjarni Hammer metti seg verða ógegnigan og fór av fundinum til viðgerðina av hesum málinum-
Einmælt samtykt, at leigugjaldið og sáttmálin heldur áfram óbroyttur fram til 31. mai 2022, tá sáttmálin verður uppsagdur, orsakað av at kommunan ynskir at nýta hølið til annað endamál.

**Býráðið 16. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Kommunustjórin 15.04.2022**
Heitt verður á fíggjarnevndina um at taka støðu til leigusáttmálan (Ískotið dagf. 10.06.2021) millum Tvøroyrar kommunu og Sp/f 13-15- skrá nr. 5527 Vtal. 588989, Miðbrekkan 15, 800 Tvøroyri, um leigu av á Havnalagnum 46, (Gl. KGL. Handilin Pubbin) matr. Nr.492a á Tvøroyri, sum gongur út tann 31. Mai 2022.

**Fíggjarnevndin 18. maj 2022:**
Bjarni Hammer metti seg verða ógegnigan og fór av fundinum til viðgerðina av hesum málinum-
Borgarstjórin kunnar, at ongin umsókn er komin um at leingja leigusáttmálan, og mælir borgarstjórin til ikki at leingja leigusáttmálan. Einmælt samtykt ikki at leingja leigusáttmálan.

**Býráðið 31. maj 2022:**
Bjarni Hammer metti seg verða ógegnigan og fór av fundinum til viðgerðina av hesum málinum-
Borgarstjórin kunnar um, at ongin umsókn er komin um at leingja leigusáttmálan, og borgarstjórin undrast yvir at fjølmiðlar skriva um at Gl. KGL. Handilin Pubbin verður stongdur eftir ynskið frá Tvøroyrar kommunu, tí hetta ikki er rætt.

**38/22**
**21/00516-4 HTO v./ Klæmint Øster -Martin E. Leo uppskot til semju viðv. avhandan av verkætlan á Rananum**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 65/22 |
| 2 Býráðið | 31.05.2022 | 38/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 16.05.2022**
Vatngoymslu verkætlanin á Rananum er enn ikki avhanda og eru óloyst viðurskiftir millum veitaran HTO v./Klæmint Østerø og ráðgevandi verkf. hjá. Tvøroyrar Kommunu, Martin E. Leo.

Málið er drigið út, og hava fleri royndir verði gjørdar at fáa í lag eina semju millum partanir, sum nú sýnist at vera komin undir land.

Kommunustjórin mælir til at fáa heimild at taka av semingsuppskoti hjá Martin E. Leo, har Tvøroyrar kommuna heldur endaliga fyri í mestalagið **kr. 289.734,-**

**Lógargrundarlag: Kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2022, §621**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 18. maj 2022:**
Einmælt samtykt at geva umsitingi heilmild at taka av semingsuppskotinum hjá Martin E. Leo við HTO v./Klæmint Østerø, har Tvøroyrar kommuna heldur endaliga fyri í mestalagið kr. 289.734,-

**Býráðið 31. maj 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

## 39/22 LUKKA MÁL

| | | |
|---|---|---|
| | | |
| | | |
| | | |

TVØROYRAR KOMMUNA

# 40/22 LUKKA MÁL

| | | |
|---|---|---|
| | | |
| | | |
| | | |

## 41/22 LUKKA MÁL

| | | |
|---|---|---|
| | | |
| | | |
| | | |

## 42/22 LUKKA MÁL

| | | |
|---|---|---|
| | | |
| | | |

## 43/22 LUKKA MÁL

| | | |
|---|---|---|
| | | |
| | | |

## 44/22 LUKKA MÁL

| | | |
|---|---|---|
| | | |
| | | |

**Til kunningar**

**21/22**
**22/00096-1 Skattatøl 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2022 | 2/22 |
| 2 Býráðið | 22.02.2022 | 5/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2022 | 3/22 |
| 4 Býráðið | 30.03.2022 | 6/22 |
| 5 Fíggjarnevndin | 21.04.2022 | 5/22 |
| 6 Býráðið | 05.05.2022 | 11/22 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 6/22 |
| 8 Býráðið | 31.05.2022 | 21/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.02.2022**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2021/2022

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2022/23**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður við hesum kunning um skattainntøkur latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til umrøðu/-støðutakan.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 22. februar 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 30. marts 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 05. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 18. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 31. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**22/22**
**22/00190-2 IRF -Ársaðalfundur 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.03.2022 | 22/22 |
| 2 Býráðið | 31.05.2022 | 22/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 29.03.2022**
Umsitingin hevur móttikið bræv frá IRF, sum kallar inn til Ársaðalfund:
Fríggjadagin, 29. apríl kl. 10.30 á Hotel Føroyum.

Limakommunurnar eru umboðara av øll býráðslimum til aðalfundin, har hvør kommuna, undirskrivar fulltrúarváttan til býráðslim við atkvøðurættisambært viðtøkum felagsins 12. grein, 5. stk., ið skal sendast aftur til skrivstovu felagsins áðrenn aðalfundin.

Heitt verður á luttakarar um at fráboða luttøku í góðari tíð og verður døgurði verður eftir fundin.

**Dagsskrá sambært 7. grein í viðtøkum felagsins:**

1. Framløga av virki felagsins í farna roknskaparári
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar
3. Val av grannskoðara, ið skal vera ríkisviðurkendur
4. Framløga av broyttari fíggjarætlan fyri 2022 og fíggjarætlan fyri 2023 til góðkenningar
   4.1. Frágreiðing um íløguætlanina fyri 2022 og 2023
5. Framløga um kunningar- og samskiftisarbeiði hjá IRF
6. Mál, sum nevndin ella lutaeigararnir vilja hava til viðgerðar

**Viðlagt er:**

- Fulltrúarváttan at fylla út, og sum sambært viðtøkum felagsins 12. grein, 5. stk., skal sendast aftur til skrivstovu felagsins áðrenn aðalfundin
- Prentað ársfrásøgn fyri 2021
- Broytt fíggjarætlan fyri 2022
- Fíggjarætlan fyri 2023
- Uppskot um limagjald fyri 2023
- Uppskot um íløguætlan fyri 2022 - 2023
- Samanbering av rakstrinum fyri 2021, broyttari fíggjarætlan fyri 2022 og fíggjarætlan fyri 2023
- IRF viðtøkur

**Til samtyktar:** Fulltrúarváttan til býráðslim at atkvøða á ársaðalfundinum hjá IRF
Aðalfundurin.

Viðtøkur fyri IRF:

- *Grein 7. Aðalfundurin, har allir lutaeigararnir eiga rætt at møta, er evsta vald í felagnum. Tað er ikki loyvt at geva øðrum lutaeigara fulltrú at møta sína vegna.*

- *12. grein. Áðrenn aðalfundin, sendir hvør lutaeigari fulltrúarváttan til felagsins skrivstovu, har sagt verður frá hvør umboðar limin. Orðstýrarin kannar eftir, at møtt er smb. fulltrúarváttaninar.*

Umboð fyri lutapartin hjá Tvøroyrar kommunu í IRF er Anita Vibergsdóttir, fast umboð, Kristin Michelsen,varaumboð.

Alvi Mortensen, er valdur nevndarlimur í IRF, umboðandi Suðuroy.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til kunning og støðutakan.

**Býráðið 30. marts 2022:**
Kristin Michelsen mælir til at Anita Vibergsdóttir fær fulltrúarváttan at atkvøða á aðalfundinum í IRF vegna Tvøroyrar kommunu. Einmælt samtykt.

**Býráðið 31. maj 2022:**
Aðalfundarfrásøgnin var umrøtt og kunnað. Alvi Mortensen greiddi frá um framtíðar ætlanir hjá IRF í Suðuroynni, har stórar útbyggingar liggja fyri framman í Trøllavík.

**23/22**
**22/00224-2 Tvøroyrar skúli -hagtøl / næmingatal**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 7/22 |
| 2 Býráðið | 31.05.2022 | 23/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 14.05.2022**
Skúlastjórin hevur sent til kunningar hagtøl fyri næmingatøl í Tvøroyrar skúla pr. 1. mai. 2022:

- 220 næmingar
- 12 eftirskúlanæmingar
- 4 flóttarbørn.

**Lógargrundarlag:** Fólkaskúlalógin

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til kunning.

**Fíggjarnevndin 18. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 31. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

## 24/22 LUKKA MÁL

| | | |
|---|---|---|
| | | |
| | | |

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

## 25/22 LUKKA MÁL

| | | |
|---|---|---|
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |

Fundurin lokin kl. 20:05

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen